# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**BMW 318TDS 5H**
Árg 1997, Km 146.000. mynd manglar. *Prísur fyrr Kr. 125.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 105.000,-**



**CITROEN C3 1.4HDI PRESTIGE**
Árg 2002, Km 66.000. *Prísur fyrr Kr. 120.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 100.000,-**



**CITROEN XANTIA 2,0HDI**
Árg 1999, Km 103.000. *Prísur fyrr Kr. 110.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 90.000,-**



**OPEL ASTRA 2.0TDI STC**
Árg 2000, Km 116.000. **Kr. 115.000,-**

**HYUNDAI ACCENT 13I 3H**
Árg 2000, Km 71.000. **Kr. 75.000,-**



**MITSUBISHI LANCER 1,3I**
Árg 1998, Km 55.000. mynd manglar. **Kr. 68.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0D4-D 4H**
Árg 2001, Km 72.000. mynd manglar. *Prísur fyrr Kr. 140.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 120.000,-**



**CITROEN XSARA 2.0HDI 110HK**
Árg 2000, Km 118.000. **Kr. 110.000,-**



**NISSAN ALMERA 1,5I**
Árg 2003, Km 24.000. mynd manglar. **Kr. 125.000,-**



**MERCEDES-BENZ E300 AUT. SVARTUR**
Árg 1997, Km 121.000. mynd manglar. **Kr. 290.000,-** Selist fyri kunda.



**CITROEN XSARA 2,0HDI**
Árg 2002, Km 59.000. mynd manglar. **Kr. 139.000,-**



**MERCEDES C180 ELEG. LEÐUR/KLIMA**
Árg 1995, Km 194.000. *Prísur fyrr Kr. 169.000* – **Nú sertilboð uttan bil í býti 125.000,-**



**CITROEN XSARA PICASSO 1,6I**
Árg 2004, Km 22.000. mynd manglar. **Kr. 165.000,-** Selist fyri kunda.

CITROËN
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo
DANAK
DNV

## MAZDA 323F



Frá apríl 1996, koyrt 130.000 km, grønur, v/powerstýring, aircondition, centrallás.
Sera vælhildin bilur.

**Selist um hóskandi boð fæst**

☎ 51 13 75

## Mercedes Benz 200 D



Árgang 1966, koyrt 88.000 km, reyður, diesel.
Ellisaktar í góðum standi. Bilurin er høvuðsumvældur og lakkeraður fyri trimum árum síðani.

## Opel Kadett



Árgang 1973, einans koyrt 54.000 km, reyður, bensin.
Bilurin er í sera góðum standi. Hevur havt ein eigara tey fyrstu 28 árini.

## Mercedes Benz 280 CE



Árgang 1978, koyrt 104.000 km, gráur, bensin, 185 HK, 2800 cc, 6 cyl. rekkjumotor.
Bilurin er í góðum standi.

Ringið 216409

# Dagsskeið um ferðslu í Roskilde

**Um nóg nógv tekna seg skipar Ráðið fyri Ferðslutrygd fyri einum dagsskeiði í Roskilde mánadagin 19. september 2005, har høvi verður at royna seg á royndar- og hálkubreyt og at hyggja at ferðslutrygdartiltøkum í Roskilde**

TÍÐINDASKRIV



Mánadagin hin 19. september 2005 fer Ráðið fyri Ferðslutrygd at skipa fyri dagsskeiði í Roskilde í Danmark. Evnini á dagsskeiðnum eru hesi:

* royndarkoyribreyt/hálkubreyt
* ferðslutrygdartiltøk í Roskilde

Flogið verður til Roskilde kl 7.30 á morgni og lent verður aftur í Vágum á midnátt.

Endamálið við dagsskeiðinum er at seta spurningin við nevndu evni í brennidepilin. Støðan er tann í dag, at flestu lond krevja koyriroyndir á royndarkoyribreyt/hálkubreyt, tá ið koyrikort verður tikið. Um vit ikki hava somu umstøður, er vandi fyri, at koyrikort okkara missir virði.

Hvørt ár senda fyritøkur og stovnar nógv fólk uttanlands at venja á royndarbreyt / hálkubreytum fyri at dagføra koyriførleikan. Hetta kundi eins væl verið gjørt í Føroyum.

Meðan vit eru í Roskilde, verður høvi eisini nýtt til at hyggja eftir, hvussu Roskilde kommuna hevur skipað ferðslutrygdina í býnum.

Til ber at leita sær fleiri upplýsingar á hesum støðum:

- um KTI (Køreteknisk Institut) á www.kti.dk
- um ferðslutrygdarætlanir í Roskilde á www.roskildekom.dk - leita eftir: trafiksikkerhed.

Kostnaðurin fyri dagsskeiðið fyri hvønn er kr. 5.000, - alt íroknað - t.e. fyrilestrar, koyriskeið, flutningur, tiltøk og matur. Tað krevst at uml. 50 luttakarar melda seg til skeiðið, fyri at tað skal lata seg gera. Upp eftir er luttakaratalið avmarkað til talið á plássum, sum eru í einum flogfari.

Mánadagin 5. september verður støða tikin til, um tiltakið verður gjørt ella ikki.

Meira fæst at vita við at venda sær til Ferðslutrygd 310204 - rff@rff.fo.